## Klumman



Kristine Stricker Hestbech
kristinehestbech@mail.dk

## Far Færøerne, Far vel

Det er underligt, det med tiden. Hvor forskelligt den opleves. Som uendeligt lang, når man sidder til mundtlig eksamen og ikke har mere at sige, eller når sommerferien i sommerhuset drukner i regn og blæst. Og så er der andre gange hvor tiden bare forsvinder, som sandet mellem fingrene på en. Sådan har det været med mine 6 måneder heroppe hos jer, blandt får og storme og fjelde. Et halvt år, en hel vinter, med gudstjenester og foredrag, undervisning og sjælesorg, begravelser og bryllup og dåb, og hvor I alle har taget imod mig med åbent sind og ansigt, og givet mig en uforglemmelig tid. I har åbnet jeres hjem og skænket mig sære smagsoplevelser af grindebøffer og skærpekød, tørret fisk og spæk. Og ikke mindst skænket mig snaps. Af det lille glas i køkkenet, som tegn på gæstfrihed og glæde. Jeg har travet i jeres fjelde og faldet i åer, jeg har kørt i tåge så tæt som mælk og gledet baglæns ned af bakkerne med mine dumme danske vinterdæk. Jeg har kørt i orkan med 5 km i timen og er hver gang blevet ringet op af folk, som bekymrede sig om, hvorvidt jeg var kommet hjem. Jeg har holdt gudstjenester hvor tårerne stod mig i øjnene, så smukt synger I og jeg er blevet lukket ind i jeres liv og jeres tanker, jeres drømme og længsler på en måde som gør mig meget, meget ydmyg. Tak skal I have, alle I smukke færinger, på bygd og på skib, i kirkerne og i hjemmene. Jeg sejler nu atter ud på ukendt hav, og ved endnu ikke hvilken havn jeg kommer til at lægge til i, men uanset hvor jeg er, vil jeg huske jer for alt det I gav mig, og takke Gud for Hans uransagelige veje der førte mig her til. Pas godt på jeres 18 øer og på alt det, der gør jer til et helt unikt folk på denne klode. På tirsdag den 11. marts holder jeg min sidste gudstjeneste i Hoyvik kirke kl. 19.30 men allerede den 31. marts kommer jeg herop en uges tid og holder foredrag. Så helt farvel er det ikke!

## Heini bloggar úr Ísrael

**Komandi seks mánaðirnar fer Heini í Skorini, sum er í starvsvenjing á donsku ambassaduni í Tel Aviv, at skriva bloggar í vikuskiftisinnlegginum hjá Sosialinum. Heini fer at skriva um og úr gerandisdegnum í Ísrael.**

# Hvussu fer Sonja Jógvansdóttir at halda altjóða kvinnudagin?

*»Hey Heini,*
*Í sambandi við Kvinnudagin ætla vit bara at hava greinar um kvinnur í Vikuskifti. Hevur tú møguleika at gera eina kvinnurelevanta bloggu?«*

Eina kvinnurelevanta bloggu? Tá eg las oman fyri standandi teldupost frá einum harra ovarlaga í hierarkinum í Vágsbotni, fóru tankarnir at mala. Tí hvat er ein "kvinnurelevant" blogga í mun til allar aðrar bloggur? Er ein "vanlig" blogga so ein "mannlig" blogga, meðan vit í undantaksstøðu altjóða kvinnudagin skriva eina bloggu bert til kvinnur?

Eg havi einki svar. Og orsøkin er, at alt hetta býtið av "tí mannliga" og "tí kvinnuliga" hongur mær og mongum øðrum langt út úr hálsinum. Alt hetta prátið um tey hørðu mannligu virðini øðrumegin og tey bleytu kvinnuligu virðini hinumegin, sum var so dominerandi í valstríðnum, at tað einasta, sum manglaði, vóru vallyfti um forboð ímóti motorsúkklum, Premier League, viagra, undirhúsinum og Tekniska Skúla.

Vit kunnu øll vera samd um, at vantandi javnstøðan í Føroyum er ein stór og fúl skomm, at stríðið fyri øktari javnstøðu er eitt háborið politiskt mál, og at tað var ein gleðisdagur, tá talið av parlamentarisku kvinnuumboðanini meiri enn tvífaldaðist tann 19. januar (hóast vit als ikki eru komin á mál).

Men hvat snúði tann upprunaligi bardagin fyri øktari javnstøðu seg um? Jú, hann snúði seg júst um at dekonstruera uppbýtið av tí mannliga og tí kvinnuliga. Hann snúði seg um at gera upp við ein diskurs, sum hevur góðtikið hugtakið "kyn" og hugmyndina um eitt mannligt og eitt kvinnuligt univers. Beint ímóti patriarkalska og tignarliga fedrasamfelagnum var kjarnuboðskapurin hjá Mary Wollstonecraft, Margaret Mead og Simone de Beauvoir, at hugtakið "kyn" er ein kulturell og sosial konstruktión, sum í øldir hevur verið nýtt til at reprodusera eksisterandi valdsstrukturar. Ein parasittur, sum hevur gnagað seg fastan í okkara mentan og tilvitsku, og sum skal blakast á øskudungan ongantíð ov skjótt. Fyrst og fremst við at avnokta sjálva premissuna um eina kvinnuliga og eina mannliga sferu, og við at gera upp við hugmyndina um, at lívfrøðin skal tæna sum ein legitimur grundarsteinur undir valds- og uppgávubýtinum í tí sosiala og politiska rúminum, sum ein góð reyðglóðandi vinkona mín ein dagin tók til.





*Tzipi Livni og Condoleezza Rice, uttanríkisráðharrar hjá Ísrael og USA, hava verið í miðdeplinum alla vikuna, nú Condi er í Ísrael og roynir at fáa ferð á friðarsamráðingarnar millum Ísrael og palestinsku stjórnina. Munnu Livni og Condi hátíðarhalda altjóða kvinnudagin?*

Hetta skuldi verið logikkur fyri búrhønur. Men partar av sokallaðu føroysku feministunum føra í staðin eitt umvent javnstøðustríð, sum einans endurframleiðir gróðursettu hugsanina um menn øðrumegin og kvinnur hinumegin. Í staðin skulu vit promovera boðskapin um, at samfelagið er ein grá grynna av fjølbroyttum menniskjum, har slag av kyni – eins og slag av húðaliti, kynsligari orientering, trúgv o.s.fr. – er sekundert og óviðkomandi í mun til førleika og dugnaskap. Tástani hava vit sanna javnstøðu.

**»Partar av sokallaðu føroysku feministunum føra eitt umvent javnstøðustríð, sum einans endurframleiðir gróðursettu hugsanina um menn øðrumegin og kvinnur hinumegin«**

***

Her í Ísrael hava tvær kvinnur verið í miðdeplinum alla vikuna. Seinasta vikuskifti stóð Gaza í ljósum loga, tá ísraelski herurin framdi eina harðrenda atsókn, og heilir 107 palestinar lótu lív, harav fleiri sivil og millum teirra tíggjutals børn og ung. Hetta vóru harðastu samanbrestirnir millum Hamas og ísraelska herin síðani 2005, og nú royna tær báðar Condoleezza Rice og Tzipi Livni, uttanríkisráðharrar hjá USA og Ísrael, at bjarga skroypiligu friðarsamráðingunum millum Ísrael og palestinska sjálvstýrismyndugleikan. Ein myndugleiki, sum viknar í hvørjum yvir fyri militantu Hamas-rørsluni, sum Ísrael fær truplari og truplari við at halda uttanfyri samráðingarhølini.

Gud viti, hvussu tær báðar Condi og Livni fara at hátíðarhalda altjóða kvinnudagin? Eg ivist í, at tað verður við at lesa um kremfarvaðar kommodur, nýggjasta hondkremið og vakrastu Oscar-kjólarnar í ísraelsku útgávuni av Kvinna, Alt for Damerne, Vogue ella fyri tað kvinnuserblaðnum hjá Sosialinum.

Og tað vænti eg heldur ikki, at Kristina Háfoss, Helena Dam á Neystabø, Sonja Jógvansdóttir, Dagmar Joensen Næs, Marita Rasmussen ella Rúna Hilduberg fara at gera.

*heini_skorini@yahoo.co*